Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um hvat verður gjørt á Nólsoyarleiðini, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvat verður gjørt ítøkiliga til tess at loysa siglingina um Nólsoyarfjørð, nú støðan er versnað uppaftur meira hjá nólsoyingum við brekunum hjá Erlu Kongsdóttir og Hasfjord?

2. Hevur landsstýrið tikið nøkur bráðfeingis stig til tess at útvega annað skip, til Ternan kemur aftur av beding?

3. Hvussu metir landsstýrismaðurin um tað almenna skrivið, sum seks sjómenn í Nólsoy hava sent landsstýrismanninum?

4. Hvussu eru útlitini hjá nólsoyingum fyri at fáa nøktandi ferða- og farmaflutning nú um høgtíðina og millum jólanna – til Ternan kemur aftur í sigling?

Viðmerkingar:

Støðan hjá nólsoyingum við ónøktandi ferða- og farmaflutningi stendur tíverrri við og versnar. Seinast við óhappunum hjá Erlu Kongsdóttir og hjá Hasfjord – og boðunum um, at klassingin av Ternuni dregur út.

Tað snýr seg um eina ótolandi støðu hjá nólsoyingum, sum má loysast nú um jólini og inn í nýggja árið.

Tí verður heitt á landsstýrismannin um at svara skjótast møguligt, so útlitini og loysnirnar verða lagdar fram alment og fyri nólsoyingum.

Á Løgtingi, 16. desember 2020

Høgni Hoydal